# Annað beinið í fiskivinnu - hitt í oljuvinnu

*Brøðurnir Hans Andreas og Gunnbjørn eru undangongumenn í føroyskari vinnu, nú vit hava lagt eina øld aftan fyri okkum og hava sett á 2000*

JAN MÜLLER

Týsdagin kom av skipunum í vaksandi flotanum hjá reiðarínum Thor í Hósvík fyri fyrstu ferð til Føroya.

Thor Chaser er gamal norskur rækjubátur, sum Thor keypti í 98. Tá høvdu norðmenn brúkt hann sum chasebát í tvey ár. Thor hevur síðani hildið fram í somu vinnu við útlendskari manning men við føroyskum skipara. Báturin er í drift í Norðsjónum, har hann er chase- og supportskip hjá seismikkskipum. Uppgávan er at sigla framman fyri seismikkskip fyri tað mesta og halda øðrum skipum burtur umframt at fara eftir vørum og útgerð, sum seismikkskipunum tørvar.

Gunnbjørn Joensen, annar av reiðarunum sigur við Sosialin, at skipið skal á beding í Føroyum. M.a. skal ymiskt gerast við botnin. Teir bóðu um tilboð her, og Vágs Skipasmiðja var bíligast og fekk tilboðið. Nú so nógv hevur verið tosað um at fáa oljuvirksemi til Suðuroynna man hetta helst verða eitt tekin um, at suðuroyingar eru kappingarførir og kunnu bjóða seg fram sum veitarar til eina komandi oljuvinnu. Helst man tað eisini vera fyrstu ferð, at eitt frálandaskip verður umvælt í Vági.



*Thor Chaser hjá Thor í Hósvík á Havnini týsdagin, áðrenn hann fór á beding í Vági. Gunnbjørn Joensen, reiðari sær stórar møguleikar hjá hesum og øðrum skipum teirra í komandi leitingini við Føroyar. Mynd Jan Müller*

### Gott boð uppá komandi avbjóðingar

Reiðaríið Thor í Hósvík er helst eitt av okkara bestu boðum í dag uppá føroyskt virksemi í frálandavinnuni. Felagið, sum eigur fimm skip og leigar eitt hevur í eina tíð leigað skipini út til frálandavinnuna í Norðsjónum og við Vesturafrika. Eisini hava teir havt uppgávur á føroyskum øki og vestan fyri Hetland.

Umframt at taka sær av uppgávum í frálandavinnuni eru eisini onkur av skipunum hjá Thor til fiskiskap. Í blaðnum í gjár frættu vit um Túgvustein, sum var farin á laksaveiðu eftir 9 ára steðg.

### Bróta upp úr nýggjum

Tað eru brøðurnir Hans Andreas og Gunnbjørn Joensen, sum standa aftan fyri Thor, ið hevur heimstað í Hósvík. Báðir eru teir sjómenn, ið royna at fylgja rákinum í vinnuni nú vit eru farin inn í eina nýggja øld. Teir hava lagt seg eftir at fjøltátta virksemið fyri harvið at fáa mest burtur og fyri at hava nakað at standa ímóti við, og tí hava teir valt at tvs. at hava annað bein í fiskivinnuni og hitt í nýggju frálandavinnuni.

Í dag hevur fyritøkan millum 50 og 60 mans í arbeiði. Meðan Hans Andreas stendur á brúnni á Túgvusteini og roynir at seta skjøtil á aftur føroysku laksaveiðuna, stendur bróðurin Gunnbjørn við róðrið á skrivstovuni í Hósvík, har boð eru eftir skipunum hjá reiðaríinum. Tað er m.a. komandi oljuleitingin við Føroyar, sum bankar á dyrnar. Gunnbjørn, sum roynir at fylgja við gongdini á hesum øki og sum sjálvur hevur verið við á oljumessum, hevur stórar vónir til komandi virksemið á føroyska landgrunninum. Hóast teir ikki bara leggja seg eftir at gerast veitarar til eina frálandavinnu við Føroyar - teir hava longu drúgvar royndir aðrastaðni - so er greitt, at teir síggja Føroyaøkið sum komandi stóru avbjóðingina hjá reiðaríinum. Og tað er heldur einki dulsmál, at bæði Gunnbjørn og Hans Andreas síggja stórar møguleikar í komandi føroysku frálandavinnuni hjá einum reiðaríi sum Thor.

Gunnbjørn heldur tað vera heilt náttúrligt, at føroyingar sjálvir eru við til at átaka sær slíkar uppgávur í eini komandi frálandavinnu. Hann metir sjálvur, at 2001 verður árið, tá rættilig gongd kemur á, og tá ætla teir sær at vera til reiðar við skipum sínum.



*Fjølbroytni í vinnuni. Annað beinið í fiskivinnuni og hitt í frálandavinnuni. Eftir at hava verið umborð á Thor Chaser í Havn gekk leiðin til Kollafjarðar at hyggja eftir laksinum, sum Túgvusteinur hevur veitt við Føroyar*

Mynd Jan Müller




Í býin - altíð eitt stað at fara

Streymoy

Kaggin
HJARNAR
spæla til dans fríggja- og leygarkvøldið
Kaggin
www.kaggin.fo

CAFÉ NATÚR
* * *
Staðið har vit hittast
***

AUTO
- Dag sum nátt -
- skjótt og gott -
Skalt tú bil hýra - so er tað 311234
AUTO
BENZIN
DIESEL
KIOSK
- ALT DØGNIÐ -
AUTO 311234

MINI BUSS TAXA 3X21

Búffar alt vikuskiftið
Fríggjakvøldið 25/2 • Leygarkvøldið 26/2 Sunnukvøldið 27/2
GALLAN Á HOTEL TÓRSHAVN BJÓÐAR:
Enskur búffur við soðsós
Chili búffur við kryddsmøri
Franskur búffur við persillusmøri
Búffur Bordelaise við reyðvínssós
Frítt val 98,-
Allir búffar verða borðreiddir við frískum grønmeti og chips.
ÓKEYPIS heimkoyring min 6. pers. Bílegging á tel. 350000
HOTEL TÓRSHAVNAR SJÓMANSHEIM

SKAR‹HAMAR´S BUSSKOYRING
v/ He›in Skar›hamar, Sleipnisgøta 13. B, FO–100 Tórshavn
TAXA
MINI BUSS TIL 10 FER‹ANDI
288888
FR • VISA • EUROCARD • MASTERCARD • JCBCARD

Norðoyggjar

Klaksvíkar Klubbi
Leygarkvøldið 26/2 vendir "MARTIN" plátum
Klubbin hevur: POOLBORÐ BILLARDBORÐ ENSKAN FÓTBÓLT Á SKY

TAXA-støðin
TEL. 21 29 00
BIL
í Klaksvík

Lesið sosialin sosialin sosialin -tað loysir seg

fk Matseðilin
Hósdagin 24. feb.: Bankikjøt
Fríggjadagin 25. feb.: Hakkibúff
Leygardagin 26. feb.: Oksasteik
Mánadagin 28. feb.: Kjøtbollar í karrysós
Týsdagin 29. feb.: Stoktan fisk
Mikudagin 30. feb.: Carbonadir
Kostnaður 30,- kr.
***
Seinnaparts-TILBOÐ
frá kl. 14.00:
Juniorburgari 14,95
Maxiburgari ella Búffsandwich 19,95
Matstovan í Hoyvík

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799
KLUBBADANSUR
Leygarkvøldið spælir DRIV

NÁTT-BUSSURIN
v/ Øssur Christiansen
Leygarkvøldið:
• Úr Vestmanna kl. 24
• Úr Tórshavn kl. 01
• Úr Vestmanna kl. 04
• Úr Tórshavn kl. 05
(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð, tá fráboðan fyriliggur)
Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu
Tlf. 424254
Bussarnir:
Tlf. 287752 • 286254

Í BÝIN
Fylgið við hvat hendir kring oyggjarnar í vikuskiftinum
sosialurin

Suðuroy

KJØLAR
spæla til dans leygarkvøldið 26/2 í VB-húsinum
Sumbiar Ítróttarfelag

Long drinks Café
CLEOPATRA
Við gongugøtuna
Opið er:
Mán.– Hós. kl. 19.00 – 23.30
Fríggjadag kl. 17.00 – 03.30
Leygardag kl. 19.00 – 03.30
Sunnudag kl. 17.00 – 23.30

Vilja tygum vi› í Í b‡in - hvønn hósdag